## Sálarfrøðingur

søkist til Føroya Barnaheim 20 tímar um vikuna, at byrja 1. september 2000 ella eftir nærri avtalu.

Føroya Barnaheim er ein samdøgursstovnur fyri børn og ung í aldrinum 0–18 (20) ár, ið kunnu búgva her í styttri ella longri tíð. Tað er barnaverndin í heimkommununi hjá barninum/tí unga, ið inn- og útskrivar børnini/tey ungu. Á Barnaheiminum er pláss fyri 15 børnum og ungum, umframt 5 bráðfeingis pláss, á tveimum deildum; eisini kunnu familjur koma til eygleiðing og síðani til vegleiðing.

Uppgávurnar á Barnaheiminum eru fjølbroyttar og verða settar út frá tørvinum hjá tí einstaka og deildunum, t.d. eygleiðingar og at leggja ætlan fyri tað pedagogiska arbeiðið.

Uppgávurnar hjá sálarfrøðinginum verða m.a.:

- sálarfrøðiligar kanningar/frágreiðingar
- terapi
- familjusamtalur
- vegleiða, undirvísa starvsfólk

og vera við til at menna stovnin saman við starvsfólkinum.

Ynskið er at seta ein autoriseraðan/kliniskan sálarfrøðing ella fólk við líknandi útbúgving.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og ummælum skal sendast til Føroya Barnaheim, att. Stýrið, Fríða Patursson, Pedda við Steingøtu 10, 100 Tórshavn innan 26. juli 2000. Løn sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og Magistarafelag Føroya.

Meira fæst at vita við at venda sær til Sólrun Jacobæus, leiðara ella Karlu Danielsen, varaleiðara á telefon 31 23 20.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøtu 10
FO-100 Tórshavn
Tlf. 312320 · Fax 311886

## Neyst í Vestmanna til sølu

Við hesum verður kappróðrarneystið hjá VÍF lýst til sølu. Um ynskiligt er at sýna ognina ber til at venda sær til starvsnevndina tlf. 424179 (Jógvan Sigurd) ella kappróðrarnevndina tlf. 424650 (Bárður).

Áhugaðir keyparar verða bidnir um at leggja skrivligt boð inn uppá neystið og biðjast senda tað til:

Vestmanna Ítróttarfelag
postboks 113 · 350 Vestmanna

Boðini skulu vera inni í seinasta lagi 22. juli 2000.

**VÍF**

*Halt* **sosialin**

## Rentubroyting

Av tí at danski Tjóðbankin hevur hækkað renturnar tann 9. juni 2000, broytir Føroya Banki við gildi frá **1. juli 2000** rentustigini á inn- og útláni við 0,25-0,75% p.a.

**Innlán**
Rentan á innláni uttan uppsøgn verður hækkað við 0,25% p.a. Fyri innlán við uppsøgn verður rentan hækkað við 0,75% sum niðanfyri víst.

| Saldo, 1.000 kr. | 3 mðr. | 12 mðr. |
|---|---|---|
| 0 - 100 | 3,25% | 3,75% |
| 100 - 300 | 3,75% | 4,25% |
| 300 - 1.000 | 4,25% | 4,50% |
| 1.000 - | 4,50% | 4,75% |

| | |
|---|---|
| Nósakonto | 4,75% |
| Nýtslu-Konto*IN* | 3,25% |
| Uppsparingar-Konto*IN* | 4,75% |
| Bústaðarkonto (+ 3% í stuðli) | 3,75% |
| 60-ára konto / Ratukonto | 5,50% |

**Útlán og kredittir**
Rentustigið á flestu útlánum - privatum sum vinnuligum - verður hækkað við 0,75% - tó verður rentan á flestu 1. veðrættarlánum til bústað bert hækkað við 0,5%.

Fyri bústaðarlán er rentan henda:

| | |
|---|---|
| 1. veðrættur | 6,50-6,75% |
| Onnur bústaðarlán | 8,25-9,25% |

Rentan á billánum er 7,50-10,25% p.a. alt eftir útgjaldi.

Gjørt verður vart við, at av tí at gjaldið á annuitetslánum er fast, hava rentuhækkingarnar við sær, at avdrátturin á hesum lánum minkar, og afturgjaldingartíðin leingist. Fyri lán við longum áramáli yvir 20 ár hevur bankin tó hækkað gjaldið soleiðis, at afturgjaldingartíðin er óbroytt.

Nærri upplýsingar um nýggju rentustigini fáast frá kundaráðgevum bankans.

**FØROYA BANKI**

## Hjálparfólk

søkist 20 t. um vikuna seinnapart til Frítíðarskúlan við 25 børnum í aldrinum 7–10 ár. Starvið er tíðaravmarkað til at byrja 1. september 2000 og endar 30. juni 2001.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Skrivlig umsókn verður at senda til Dagstovnin áðrenn 8. juli 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 442012.

**Dagstovnurin í Gøtu**
**511 Gøtugjógv**



## Tannrøktari

Søkt verður eftir einum tannrøktara til tannlæknastovuna í Klaksvík 20–30 tímar um vikuna. Løn eftir avtalu. Skrivlig umsókn við avriti av próvnum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Tannlæknastovuna**
v/ Sólvá Eystberg
Kráargøta 14 · 700 Klaksvík
Tlf. 456555 · eftir kl. 17 tlf. 457655

## Solar Føroyar

Starvsfólk søkist at byrja skjótast. Starvið umfatar sølu av el-lutum. Tað er neyðugt at hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil er eisini ein fyrimunur.

Fyrispurningar og umsókn verða at senda til

**Solar Føroyar**
Postboks 105 · Brekkutún 2
110 Tórshavn · Tlf. 317933

## Verkfrøðingur

Tórshavnar havn søkir eftir verkfrøðingi til at standa fyri teknisku umsitingini av bryggjum, bygningum o.ø. ognum hjá havnini eins o.o. fyrireikandi og umsitandi arbeiði.

Roknað verður við at umsøkjarin hevur royndir innan bygging/eftirlit/projektering, og at hann hevur kunnleika til EDV.

Umsøkjarin skal hava lætt við at samskifta, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava vilja til at søkja nýggja vitan.

Tórshavnar havn kann bjóða eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum fyri framman.

Løn sambært sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Tórshavnar havn.

Umsóknir saman við skjølum og møguligum viðmælum skulu sendast til

**Tórshavnar havn**
Postboks 103
110 Tórshavn

í seinasta lagi 6. juli 2000.

## Lærupláss

Vit hava brúk fyri einum lærlingi til rørsmíð at byrja beinanvegin.

Ert tú nærlagdur og hevur koyrikort, skuldi tú komið inn á gólvið og tosa við okkum sum skjótast.

Hógv framleiðir ketlar, arbeiðir við at selja og seta upp hitaverk, ventilatión, sanitet, umframt mangt annað.

**Hógv Handilsvirki**
660 Søldarfjørður · Tlf. 441963



## Nýstovnaði frítíðarskúlin hjá Tvøroyrar kommunu søkir eftir:

1 leiðara
1 pedagogi
1 hjálparfólki

til parttíðarstørv.

**Vit bjóða**
eitt spennandi starv, í eini nýggjari ansingarskipan fyri børn í skúlaaldri, við nógvum avbjóðingum, har dentur verður lagdur á at veita børnunum eitt spennandi og mennandi frítíðartilboð á tryggum sosialum grundarlagi.

**Vit ynskja**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.
Leiðarin skal rokna við øðrum umsitingarligum arbeiði í umsitingini hjá kommununi.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 15. august ella eftir nærri avtalu. Størvini verða lønt sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri ella við avvarðandi fakfelag.

**Umsókn**
Umsóknir skulu vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 13. juli 2000.

Tvøroyrar býráð

## Kollafjaðar Skúla

Søkt verður eftir tveimum lærarum til tíðaravmarkað størv við Kollafjaðar Skúla fyri skúlaárið 2000/2001. Annað starvið er fyri lærara í farloyvi.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, lønarflokkur frá 18.1 til 27.4.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 03.07.2000 á middegi.

**Kollafjarðar Skúlanevnd**
v/ Arnbjørn Kristiansen
410 Kollafjørður

## Sethúsaogn í Skálavík

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 10 b, Skálavík seld. Talan er um grundøki til støddar 1015 m² við ástandandi eldri sethúsum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# HANDILS LÆRLINGUR

## til Griffilin

Til handil okkara, ið selur alla skrivstovuútgerð og ymiskt annað, verður søkt verður eftir røskum, fyrikomandi lærlingi, sum dámar at hava nógv at gera...



Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so kom inn og tosa við Kára Justinussen.

griffilin
SMS • TEL 31 08 40

## Sethús í Lamba til sølu



Húsini, ið eru væl hildin, standa í friðarligum, náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni.

Grundøkið, matr. nr. 29e, er 854 m².
Húsini eru bygd í 1975 og eru 250 m² til víddar.
Kjallarahæddin: Kjallararúm, gongd, stova v/ køki, vaskirúm og fýrrúm.
Miðhæddin: Stova, køkur, wc og gongd.
Loftshæddin: 4 kømur, baðirúm og gongd.
Rúmligur hjallur og garaga við terassu á.
Rundan um húsini er væl røktur urtagarður.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu síggja húsini eftir nærri avtalu við at venda sær til tlf. 447761 ella 283533, fax 319736.



# TOYOTA TILBOÐ

Sosialurin - 311820

| Merki | Árg. | km. | Prísur |
|---|---|---|---|
| Toyota Corolla Lune 5 hurðar | 1999 | 36.000 | 125.000,- |
| Toyota Corolla 4 hurðar | 1995 | 138.000 | 85.000,- |
| Toyota Carina 1,8 4 hurðar | 1996 | 59.000 | 118.000,- |
| Toyota Carina II 4 hurðar | 1990 | 170.000 | 59.000,- |

**OPEL** við Oyggjarvegin
Tel. 31 61 61 - 21 61 60

## Summartilbo›

## -15%

# Eg eri kløn aftur!!

**Brit Anne Hesvik, lærari í Tolvsrød, Noreg**



»Hetta er heilt ótrúligt«, sigur Brit Anne Hesvik sum eftir vi›ger› í tríggjar vikur vi› Gaio Form er klænka 8,4 cm. um mi›juna (3 støddir), 12,7 cm. um búkin (5 støddir) og 6 cm um mjadnarnar (2,5 støddir).

»Eg gavst at roykja og fór at eta..« flennir Brit Anne og l‡sir stø›una hjá nógvum kvinnum og monnum. »Eg fittna›i og avgjørdi eftir nøkur ár at okkurt mátti gerast. Takka› ver›i Gaio Form, sum sameinir elektrolipolysu og lymfedrenagu, tapti eg 4 kilo eftir trimum vikum og gangi nú aftur í gomlu klæ›um mínum. Kroppurin kennist nú aftur fastur og fínur. Hetta kann trygt tilmælast«.

*Brit Anne Hesvik,*
*lærari í Tolvsrød*

**Føroya Natúrmedisinska Klinikk**
**Sundsvegur 10 • 100 Tórshavn**
**Tlf. 320395 má.-frí. kl. 9-11**
**Gó›kent Gaio©umbo›**

## Til viðskiftafólk okkara

Sagt verður frá, at vit gevast við handlinum og bakarínum tann 30. juni 2000.

Í hesum sambandi vilja vit bjóða til ein kaffimunn

**mikudagin 28. juni millum kl. 13 og 15.**

Samstundis nýta vit høvið at takka tykkum øllum fyri samskiftið vit hava haft øll hesi mongu ár og ynskja tykkum øllum alt tað besta framyvir.

**Bakaríið hjá Eiler í Klaksvík**

## Frítíðaravloysari

Bilførari við stóra koyrikortinum søkist at koyra lastbil/tangabil sum frítíðaravloysari. Byrjast kann beinanvegin.

Áhugað kunnu ringja til Andrias á tlf. 347400 lokal 230.

**P/F Føroya Shell**

**www.sosialurin.fo**